

# Hann sær tað mesta

**SENSORAR** Teir sum hava verið á sjónum vita, hvussu stóran týdning tað hevur at hava góðar sensorar á trolinum. Ein teirra sum veit nærum alt um hetta, er íslendingurin Óskar Axelsson, umboðsmaður hjá fyritøkuni Marport.

Orð/myndir: Snorri Brend

Óskar var sjálvandi við á North Altantic Fish Fair í Klaksvík í farnu viku.

Her kundi hann oysa út av vitan síni til tey ið vitjaðu bás hansara, og sum uppaftur var partur av básinum hjá føroysku fyritøkuni Vikmar. Hesar báðar fyritøkurnar hava samstarvað síðani í 2002.

Nevnast kann eisini, at nýggja Norðborg, sum hevur heimstað í Klaksvík, er eitt av skipunum við sensorum frá Marport.

Hesin góði Óskar hevur í dag ábyrgd fyri menningina innan vinnuligan fiskiskap hjá Marport, við serligum denti á sensorarnar í trolinum.

Úr skrivstovu síni í íslendska høvuðsstaðnum stjórnar hann í dag útbreiðsluni av hesum sensorunum, sum bæði verða brúktir á havsins botni og undir havsins botni.

Í dag eru 100 fólk knýtt at fyritøkuni.

snorri@sosialurin.fo



**SENSORUR**

*Allir trolarar hava sensorar á trolunum, men hesir verða eisini brúktir til hernaðarlig endamál. - Okkara framleiðsla er væl dámd, sigur Óskar Axelsson frá fyritøkuni Marport*

## Tað er grønt

Green IQ hevur longu við heiti sínum boðað frá, hvat endamál teirra er: Alt virksemið snýr seg um loysnir sum skulu gera sítt til at verja umhvørvið og náttúruna.

Eitt av teirra hugskotum er lensarin, ið verður umrøddur aðrastaðni á síðuni. Men teir hava eisini gjørt sínar royndir við einum brintbussi og víðkaðum tróðurhita, bara fyri at nevna nakað.

Felagið hevur heimstað í Kollafirði. Meiri kann lesast um Green IQ á heimasíðu teirra: www.greeniq.fo

## Norðast til sunnast við Oyggjablaðnum




**Síðani á vári í fjør hevur Sosialurin havt Oyggjablaðið sum eitt eykablað í hvørjum mikudagsblaði.**

**Her hava vit vitjað kring oyggjarnar, eins og vit hava tikið upp ávís viðkomandi evni, so sum veiðu, føroyska framleiðslu, bilar, fiskivinnu og bøkur.**

**Í Oyggjablaðnum eru vit nú í gongd við eina nýggja rundferð kring oyggjarnar, sum í stóran mun fylgir 7. breiddarstigi á heimsatlasinum.**

**Vit hava valt at kalla rundferðina "Føroyar - norðast til sunnast". Ætlanin er so líðandi, men tó ikki slaviskt - at vitja flestu bygdir og oyggjar, ið liggja nærhendis hesum ása hetta komandi árið.**

**Góðan lesihug.**

snorri@sosialurin.fo